# Bjørk við mikrofonini

## Bjørk K. Olsen hevur prátað við nøkur ung fólk um hár her og har



**Kvinna, 18 ár:**

***Hvat heldur tú um, at mannfólk hava hár í neðra?***

Eg haldi, at mannfólk skulu í øllum førum trimma sær eitt sindur. Tað er ræðuliga ólekkurt, tá mann kemur niður til eina plantasju og fær hár í munnin. Hinvegin skal alt ikki burtur, tí tað er eitt sindur sum at fara í song við einum smádrongi, og tað er ikki serliga sexutt.

***Hvussu við hári aðrastaðni á kroppinum hjá mannfólki?***

Teir mugu gjarna gera nógv burtur úr útsjóndini. Men teir skulu varðveita sín maskulinitet. Vit konufólk eru mjúkar og femininar, og vildu vit gjarna hava tað, so høvdu vit fingu okkum eitt konufólk. So nei, teir skulu ikki raka hárini av aðrastaðni á kroppinum.

**Hvussu við tær sjálvari?**

Tað er eitt sindur ymiskt. Nú eri eg ikki í nøkrum føstum forholdi og havi einki støðugt sexlív. So rakiblaðið fer kanska ikki so ofta oman har, sum tað hevði farið, um eg fór oftari úr trussunum. Men tá eg raki mær, raki eg viðhvørt alt av, so tað er longri ímillum, at eg noyðist at hampa tað aftur. Um eg havi góða tíð og ikki havi rakað mær leingi, havi eg onkuntíð roynt at raka ymisk mynstur.

***Hví rakar tú tær?***

Tað er helst mótin, sum ger tað. Tað er eitt sindur býttisligt, tá øll vita, at vit hava hár. Hinvegin, so haldi eg, at tað er nógv penari, um hárini eru hampað – klipt ella tikin við einum trimmara. Bikinilinjan skal eisini rakast burtur. Restin er bara móti og gevur egentliga onga meining.

---

**Kvinna 20 ár:**

***Hvat heldur tú um mannfólkahár í neðra?***

Tað kemur ótrúliga nógv an uppá, hvussu nógv hár talan er um. Tað er altso ikki tað allarlekrasta at fáa hár í munnin. Eg haldi ikki, at tað er so farligt, hvussu nógv teir raka av, men um teir ikki raka sær, mugu teir gjarna hampa sær eitt sindur.

***Hvussu við aðrastaðni á kroppinum?***

Eg haldi, at drongir skulu ikki raka sær ov nógv. Hár undir hondunum og bringuhár skulu vera har. Tað skal ikki vera soleiðis, at mann liggur við einum smádrongi. Beinini skulu slett ikki rakast – tað er ómaskulint.

***Hvussu við tær sjálvari?***

Eg raki ikki alt burtur – eg havi eina striku beint nú, men tað er rættiliga ymiskt. Viðhvørt hugsar mann: Nei, hetta riggar illa, so raki eg alt av. Eg haldi tó ikki, at tað er so feminint, um alt er burtur. Tá líkist man einari smágentu.

***Hví rakar tú tær?***

Eg føli meg reinari og penari, eg dugi ikki ordiliga at siga hví.

***Hevur tað nógv at siga, hvat mannfólk halda um tað?***

Tað hevur nógv at siga, hvat mannfólk halda, ja. Eg kann siga, at um sjeikurin hjá mær dámdi best, at eg var heilt rakað, so hevði eg gjørt tað, og eg hevði ikki havt tann stóra trupulleikan við tí sjálv.

---

**Maður, 20 ár:**

***Hvat heldur tú um konufólkahár í neðra?***

Í modernaða seksualitetinum er tað næstan ein óskrivað lóv, at kvinnur skulu raka sær í neðra. Eg eri ikki so glaður fyri at siga tað, men mær dámar tað betri, at tær eru rakaðar. Vit eru von at verða seksuelt stimuleraði gjøgnum porno, har 99 prosent av kvinnunum eru rakaðar – heilt ella eitt sindur. Tað er blivið óvanligt ikki at raka sær.

***So tað er líkamikið, hvussu nógv verður rakað av?***

Tað kann henda seg, at ein genta, sum hevur rakað alt av, verður eitt sindur ov smágentuslig. Tað kann vera eitt sindur frástoytandi.

***Hvussu við hári undir hondunum og á beinunum – skulu tey burtur?***

Um ein kvinna hevur hár undir hondunum, hevur tað eina maskulina útstráling, og tað er tí ikki so eggjandi. Tað kann virka sum um, at hon leggur lítið í seg sjálva og er óhygiejnisk. Beinini eru hinvegin ikki so farlig, men vit eru von við, at kvinnur raka beinini. Um ein kvinna hevur hár á beinunum, er tað nokkso maskulint.

***Hvussu við tær sjálvum?***

Eg raki mær ikki í neðra, men eg havi hugsað um tað onkuntíð. Eg havi ikki so kraftigan hárvøkstur, og eg havi lisið, at um menn byrja at raka sær, so tvífaldast vøksturin. Eg havi ikki havt brúk fyri tí, men eg veit um nógvar, sum trimma hárini av.

***Hvussu við bringuhárunum og hárini undir hondunum?***

Ja, eg havi rakað tað av onkuntíð bara fyri at vita, hvussu tað sá út. Tá brúkti eg fyrst ein trimmara og so eitt rakiblað. Eg haldi tó, at tað er maskulinari at hava bringuhár og hár undir hondunum.

**Maður, 19 ár:**

***Hvat heldur tú um konufólkahár í neðra?***

Eg haldi, at tær skulu raka sær. Tær kunnu gott hava eitt sindur – men ikki ein ordiligan afro. Tað sær natúrligt út, um tær hava eitt sindur, og tað er eggjandi. Ein heilt barberað genta hevur eisini sína sjarmu. Har kann vera bara eitt sindur og einki – ein strika kann eisini gera tað. Ein stórur villur duskur er ikki akkurát eg.

***Hví heldur tú, at tað er neyðugt, at konufólk raka sær í neðra?***

Eg haldi, at tað er neyðugt, tí at tað sær meiri feminint/sexut út, tá tað ikki er ein stórur frumskógur millum beinini á henni.

***Hvussu við beinunum og hárunum undir hondunum?***

Hárið skal vekk undir hondunum og á beinunum. Tað er maskulint at hava hár, og gentur skulu ikki vera maskulinar.

***Rakar tú sjálvur hárini í neðra?***

Ja, men tað verður bara trimmað, so tað sær pent út. Eg haldi ikki, at tað riggar so væl við einum feitum duski har niðri, og onkur genta fer niður har. Hinvegin skal tað ikki rakast heilt burtur – bara so tað er hampiligt.

***Rakar tú hárini av bringuni og undir ørmunum?***

Nei, tað geri eg ikki. Eg haldi, at tað er í ordan, at menn eru menn. Hinvegin fari eg í eina t-shirt við stuttum ermum, so kann eg finna upp at raka tað uttasta undir ørmunum burtur, so tað ikki stingur út undan t-shirtini. Beinini hevði eg ikki funnið upp á at rakað. Tá fer tað for langt yvir til tað feminina, so tað lati eg genturnar um.